# Flindt-Bjerg tosaði við FSF um venjarastarv

**KÍ venjarin heldur talan hevur verið um tikaralop í menningini av føroyskum landsliðsfótbólti, síðani hann eftir vitjanina við danska veteranlandsliðnum í 1989 fór at fylgja føroyska liðnum**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*

Miðlasjónleikurin, sum gekk fyri seg, tá ið FSF í 2002 skuldi finna avloysara fyri Allan Simonsen, var minnisríkur. FSF segði seg hava samband við fleiri venjarar, og tað var um reppið, at sáttmáli varð skrivaður við Benny Johansen, sum hevði verið venjari hjá Silkeborg.

Tá ljóðaði, at FSF hevði havt samband við annan danskan venjara. Tá ið tað varð almannakunngjørt, at Henrik Larsen nú var landsliðsvenjari, var tað sjálvsagt at gera ta niðurstøðuna, at hetta var hin danski venjarin, sum FSF hevði havt samband við.

Men nú sigur Ove Flindt-Bjerg, at hann hevði samband við Fótbóltssambandið um venjarastarvið.

– Eg var áhugaður. Men tað bar ikki til hjá FSF at gera spurningin av, tá ið tað var neyðugt hjá mær at fáa greiðu á framtíðini, og so gjørdu konan og eg av at halda fram í Eysturríki, sigur Ove Flindt-Bjerg, sum nú er venjari hjá KÍ. Á ongan hátt kennir hann trongd til at harta FSF fyri, at teir ikki tóku støðu um venjarastarvið í so mikið góðari tíð, at hann hevði møguleika at gera upp við seg sjálvan, um hann skuldi taka av starvinum ella ikki.

Visti tú, hvat tað var fyri fótbóltsstøði, sum tú skuldi fyrihalda teg til?

– Eg havi havt stóran áhuga fyri føroyskum fótbólti í meiri enn fimtan ár. Tað eru tvær orsøkir til tað. Onnur er, at eg í 1989 var við veteranlandsliðnum, sum spældi málleysan javnleik í Gundadali og 3-3 á Svangaskarði ímóti føroyska landsliðnum. Hin orsøkin er, at eg búði í Eysturríki, tá ið Føroyar í 1990 vunnu 1-0 á Eysturríki. Ove Flindt-Bjerg heldur, at føroyska landsliðið hevur ment seg ógvuliga nógv, síðani hann saman við eitt nú Morten Olsen og øðrum fyrrverandi donskum landsliðsspælarum dystaðist ímóti føroyska liðnum.

– Talan hevur verið um eitt skarvslop. Nú spæla føroyingar fótbólt. Støðið er nógv hægri fysiskt, tekniskt og taktiskt. Spælararnir vita, hvørjar uppgávur teir hava, og royndirnar bera við sær, at føroyingar ikki nýtast at ræðast nakran.

Fyrrverandi danski landsliðsspælarin og núverandi KÍ venjarin heldur, at føroyska landsliðið framvegis eigur at hava møguleika at mennast, og hann vísir á eitt ítøkiligt øki, har hann heldur, at tað sum skjótast eigur at verða farið til verka:

– Tað hevði lagt lunnar undir væl betri fyritreytir, um Føroyar luttóku við U-21 landsliði. Gloppið verður ov stórt í møguleikunum hjá teimum flestu at royna seg í landsliðsfótbólti, tá ið eingin møguleiki er at royna seg millum U-19 og A-landsliðið. Eg síggi U-21 liðið sum sera týdningarmiklan lið í menningini av landsliðnum og spælarunum. At spælararnir høvdu fingið henda møguleikan hevði eisini komið feløgunum og harvið øllum tí føroyska fótbóltsheiminum til góða, vísir Ove Flindt-Bjerg, sum fyri tveimum árum síðani tosaði við FSF um landsliðsvenjarastarvið, á.

Í FSF og føroyskum fótbóltstosi yvirhøvur hevur fleiri spurningurin um U-21 landslið fleiri ferðir verið uppi og vent. Higartil hevur ikki meiri enn tos um hetta verið á skránni. Fremsta orsøkin hevur verið fíggjarliga tyngdin í hesum.



*Tað er gott fyri føroyskan fótbólt, at onkrar stórar tjóðir við kendum spælarum koma í okkara bólk*

*Mynd: Álvur haraldsen*

# Landsliðið er nú gullhøna

**Hepnið í tveimum teimum seinastu lutakøstunum hevur havt við sær, at landsliðsfótbólturin hevur fingið tað at fløða í FSF kassanum**

**Jóannes Hansen**
*joannes@sosialurin.fo*

Føroyski búskapurin gongur skjótt hvønn vegin. Tað hava tað verið so nógv dømi um tey seinastu fimtan árini. Soleiðis hevur tað eisini verið í fíggjarliga grundarlagnum hjá Fótbóltssambandinum, sum serliga er grundað á inntøkurnar, ið fáast burturúr altjóða luttøkuni.

Síðsta roknskaparár var framúr gott. Nú eru nógvar milliónir á kistubotninum, og tað er eingin loyna, hvaðani peningurin stavar. At Føroyar í síðstu EM undankappingini vóru í bólki saman við Týsklandi bar við sær, at átta eyka milliónir runnu í kassan. Undan jólum varð aftur lutakast, og enn eina ferð vóru føroyingar ófatuliga hepnir. Í staðin fyri eitt nú Rumenia ella Russlandi komu Føroyar í bólk saman við Frakklandi, og tað ber við sær, at milliónirnar framvegis fara at bólta niður í FSF kassan.

Tað er óhugsandi, at hepnið í framtíðar lutakøstum fer at verða eins stórt, sum tað hevur verið tvær tær seinastu ferðirnar. Tað fer aftur at koma fyri, at Føroyar fara at koma í bólk við eitt nú Rumenia, Bosnia og Slovenia og londum, sum liggja uppaftur longri burtur – eitt nú Georgia.

Men tað fer neyvan at koma fyri aftur, at fíggjarligu ófrættirnar fara at verða so stórar, sum tær vóru í 1992. Tá varð av álvara viðgjørt, um Føroyar skuldu taka seg burturúr altjóða fótbóltssamstarvinum. Fíggjarliga grundarlagið var ov vánaligt. Semja var kortini um at halda fram, og tað hevði við sær, at Føroyar framvegis eru við í EM og HM undankappingum og í Europa Cup kappingunum.

At tað ikki fer at koma fyri, at fíggjarliga hóttanin fer at verða so stór, sum hon var fyri tólv árum síðani, hevur fleiri orsøkir. Ein er, at trygdin fyri inntøkum frá UEFA og FIFA er væl størri nú, enn hon hevur verið. Altjóða og europeiska samgongurnar býta pengar út til fótbóltssambondini. Tað gjørdu tey ikki fyri tólv árum síðani. Ein onnur orsøk er, at sáttmálarnir, sum FSF hesi seinastu árini hevur fingið fyri sjónvarpsrættindini, eru væl betri, enn teir vóru tey fyrstu árini. Áhugin fyri at eiga rættindini er størri nú, enn hann var, og royndirnar hjá FSF at samráðast eru størri, og tað hevur havt betri sáttmálar við sær.

Landsliðið er gullhønan hjá FSF. Tað er sjálvsagt, at gullhønan skal røkjast. Men tað eru fleiri pengar, enn til bara landsliðið. Hvat upphæddirnar skulu brúkast til, og hvussu nógv skal vera í FSF kassanum, eru spurningar, sum føroyskur fótbóltur skal taka støðu til. Tað er eingin trupulleiki at finna uppskot um, hvat møguleiki er at gera. Heldur verður talan um at raðfesta.






